# Løgtingslóg um Búskaparráð, sum broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 29. mai 2026

**§ 1.** Búskaparráðið fylgir við búskaparligum viðurskiftum í landinum og kemur við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina.

**§ 2.** Landsbankanevndin, sbr. § 2 í løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð, er Búskaparráðið.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur nevndarsamsýningarnar.

**§ 3.** [1)] Búskaparráðið ger eina konjunkturfrágreiðing um árið, sum verður almannakunngjørd 1. mars.
*Stk. 2.* [1)] Búskaparráðið skrivar eina temafrágreiðing um árið og kann ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum.

**§ 4.** Landsbankin røkir skrivaraupgávuna og hevur dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum.

**§ 5.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kungjørd og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð.

Í Tinganesi, 5. mai 2021

**Bárður á Steig Nielsen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 97/2020

---

[1)] Broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 29. mai 2026.